

*Tit kunnu evnt leita á heimasíðu hjá felagnum ella mynd av Transocean Rather, tvs. eina av teimum nýggju*

# Suðurkoreanar við í føroyska oljuleiting

**Suðurkoreanska oljufelagið STX Energy er nú partur av oljuleitingini við Føroyar. Herfyri kom eitt annað oljufelag í fjareysturi við í føroysku oljuleitingina, tað japanska Cieco. Og enn eitt, Idemitsu sigst vera í samráðingum at koma henda vegin**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Oljufelagið Shell hevur júst boðað frá, at tað hevur selt (farmað út, blaðm.) burtur av sínum loyvi á føroyska landgrunninum, 007 ella betri kentsum Williamleiðin. Tað er brunnurin, sum verður boraður í løtuni. Sambart Korea Herald og Energy Current hevur Shell selt 10% av sínum føroyska loyvi til suðurkoreanska felagið. Frammanundan hevur Shell selt 4% av sama loyvi til føroyska oljufelagið Faroe Petroleum. Sostatt eru nú fimm oljufeløg við í Williamboringini, nevniliga BP, Shell, Anadarko, Faroe Petroleum og STX Energy. Onkur kelda vil vera við, at Shell so smátt er við at taka seg úr føroyskum øki. Aðrar keldur siga, at Shell bert roynir at spjaða váðan enn meira.

Sum skilst hevur Shell eisini selt partar út av tveimum loyvum norðan og vestan fyri Írland til sama suðurkoreanska felag. Tað, sum er áhugavert í hesum er, at talan er um Atlantsmótið, sum við hesum fer at fáa størri fokus í altjóða oljuheiminum.

Herfyri keypti japanska oljufelagið Cieco seg inn í loyvi hjá Eni og Faroe Petroleum á føroyska landgrunninum, har hesi í ár ella í 09 fara at bora Anne Marie brunnin, sum av jarðfrøðingum verður mettur sera áhugaverdur, nú hann liggur so tætt upp at oljukeldum á bretskum øki. Enn eitt japanskt felag, Idemitsu liggur framvið skilst. Tað er í løtuni í samráðingum við oljufelag at keypa seg inn í føroyskt leitiloyvi. Við hesum verða tá trý nýggj feløg úr fjareysturi við í oljuleitingini við Føroyar. Hetta kundi bent á, at oljufeløg trúgva uppá føroyska økið.



Lesið Sosialin so eru tit við

# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Hans Jørgin Dam*
*Torkilsvegur 20*
*360 Sandavágur*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: ANNAPOLIS

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| A | N | A | L | F | A | B | E | T | I | S | M | A | N | | H |
| L | I | V | E | R | P | O | O | L | | U | I | G | | M | O |
| A | | L | I | A | S | | | F | A | N | G | A | H | Ú | S |
| B | | O | R | M | I | N | | | | N | | M | Ó | R | A |
| A | M | P | A | | S | Y | N | G | J | A | | E | R | | |
| M | | | R | | | | Ø | R | A | | I | M | I | A | K |
| A | T | A | | S | T | A | V | A | R | | V | N | | C | K |
| 532 | R | | B | Ý | | R | I | V | N | A | | O | Y | | |
| P | A | L | E | S | T | I | N | A | | | M | N | | Ø | S |
| A | P | | | L | I | Z | | R | I | T | A | | S | Ø | K |
| S | P | A | | U | F | O | | I | N | T | I | M | T | | A |
| S | A | L | O | M | O | N | | N | N | | N | | Á | L | V |
| A | N | I | | A | S | A | | | A | | H | G | L | | A |
| R | | N | Á | Ð | I | | S | A | N | G | A | R | U | M | |
| I | D | A | | U | | A | K | S | | A | R | A | L | I | A |
| N | I | | B | R | I | M | L | A | R | | D | Y | L | A | N |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**Loysunar-orðið:** ............................................ **533**

Navn: ..............................................................

Bústaður: .....................................................

Bygd/býur: .....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***